## VIÐMERKINGAR

# Tann ótolandi sjálvgleðin hjá bygdarfólki

**Agga Niclasen**
*attitude@niclasen.fsnet.co.uk*

Nøkur bygdarfólk og fyrrverandi býarbúgvar liva kátir í heimagjørdari sjálvgóðsku eftir at hava tikið atburðarligu lívsstíls-avgerðina: at flyta út á bygd.

Tær hendingaferðir, eg havi ferðast í bygdarlagnum, havi eg nevniliga varnast ein vøkstur í einum ávísum fólkaslagi; sjálvglaðar, fariseiskar bløkur; ella við at hyggja at lívsstíls-sendingum í sjónvarpinum, av hvørjum Escape to the Country fær gull. (Nei, føroyingar uttanfyri England kenna neyvan til ta aðramáta undirhaldandi sendingina á BBC 2, men er tað at missa kjarnina í málinum. Hon er at finna í tittlinum. Ja, enntá í fyrsta orðinum, "escape".) Um vit nú byrja við byrjanini, ella, sum bygdarfólk høvdu sagt, skera hvalin frá hálsinum, boða tey tær frá hvussu "vit seldu bústaðin inni í býnum og, uttan at taka eykalán, vóru vit før fyri at keypa á hesum vakra, friðsæla bletti".

Síðani geva tey tær eitt herðaklapp og bresta út "vit vita altso ikki, hvussu tú orkar alla hasa ferðsluna og larmin. Meðan tú ert staddur í undirgrundarbreytini í London, eru vit úti undir opnum himni og eyðmerkja ber og fanga síl". Og hvussu alt er so forbankað betri-smakkandi og sunt! "Marjus bóndi støkkur regluliga inn á gólvið við sínum fesku landbúnaðarvørum. Hann spyr, hvat tú kundi hugsað tær, og um tú kundi hugsað tær eitt sindur av lambskjøti, tekur Marjus frískur og ferðugur kvørkratak á lambinum beint har á stovugólvinum; ja, tað gongur so skjótt fyri seg, at konan ikki meira enn klárar at leggja okkurt verjandi á gólvið úr eikiviði", ella, "og hvønn sunnudag fáa allir borgararnir í Lykkelykkeleje leskiliga, nýpressaða saft frá fruktgarðinum. Troels tekur sær av hesum vikuliga tiltaki, har hann sjálvandi brúkar alt súreplið og vevur steinin, klunkar av børki, ormarnar og vespurnar upp í, og tað smakkar ikki nær náminda sum hatta kemiska tilfarið, tit fáa í stórbýnum".

Ikki tí at nakar av bygd veruliga nertir hasa "vistfrøðisligu" skurvblandingina, tá ið tey øll koyra til avbygdarsølumiðstøðir tætt Keypmannahavn sum OBS og Bilka at keypa akkurát ta somu, smakkleysu, viðgjørdu mykjuna, vit onnur drekka.

Og so er tað hetta her við hvussu væl tey eru fallin inn í smásamfelagið. "Síðstu viku savnaðist øll bygdin fyri at hátíðarhalda at posthúsið hevði 30 ár á baki. Tað var so stuttligt, tí vit skuldu øll somul taka lut í eini kapping, har vit slongdu vembur út úr einum heimagjørdum sleingjusessi; og tú kanst bara ætla, hvussu eldhugað, ja, uppglødd bygdin bleiv, tá ið Melinda næstan rakti sálarliga brekaða persónin í bygdini--hon eitur eisini Melinda, altso, ikki "Blinda", men Melinda. Og, veitst tú hvat? Av onkrari orsøk halda vit í bygdini næstan tað sama um alt. Vit hava tær somu meiningarnar, Agga. Til dømis eru vit øll somul glað fyri nýggja barnagarðin. Er tað ikki 'herligt'?".

Tínæst er tað noktanin; at tey ikki missa nakað (síðani tey fluttu út úr býnum). "Um vit vilja hava okkurt "útlendskt", skula vit bara koyra í tveir tímar. Og um Matteus hevur tørv á nøkrum eykalutum til heimavirkið, kann hann altíð rógva út á alnótini ella koyra inn í býin og bíleggja". Men her er okkurt órógvandi mannafíggindaligt í hesum. Við at hátíðarhalda afturtøkuna frá býnum siga nøkur: "Er tað ikki undurfullt ikki at vera nærindis fólki".

Orsøkin til at tað er meira gangur í býnum, at býir eru meira skundmiklir og at tað tekur longri tíð at ferðast og koma fram enn í bygdum, er tí at tað eru fleiri fólk í býnum. Tað er jú nærum flóvisligt skil í hesum: at havna huggreiniligheitina, hugsi eg, er tað sama sum at siga, at fólkaflokspolitikarir ikki kunna vera 'kreativir'. Tá ið 'bygdarlagsumvendingurin' greiður tær frá, hvussu vakurt tað er á teirra "vakra, friðsæla bletti", sigur hann veruliga: "Tú kanst hyggja út ígjøgnum gluggan í fleiri tímar uttan at síggja eitt tað einasta medmenniskja". At síggja hetta sum hugfarsligt, sjálvt "friðsælt", er ikki at virðismeta vakurleika, tað er antin at vera ein bløka í ringum lag ella mentanarsnobbur. Tað er eins neyðarsligt sum at siga: "Eg fór til hetta óveruligani góða ballið í gjárkvøldið – ikki ein kykur kjaftur har uttan eg. Tónleikurin var ikki hart frá og eg kundi alt fyri eitt vraka allar hasar elektriskt forbankaðu Suede-ljómfløgurnar. Eingin popptónleikur, bara klassiskur. Og hvalaljóð, sjálvandi. Ja, og ikki at gloyma, eg hevði allar pistasiunøturnar fyri meg sjálvan".

Ikki bara hava býir fleiri fólk, ymiskleikin av fólkinum er nógv størri. Ein býur sum London hevur í dag eitt rúmari vav av tjóðbólkum enn New York við tí úrsliti, at býurin hevur eina ovurnøgd av øllum møguligum slagi av mati og tónleiki. Harafturímóti, hvussu listaliga strálandi so nøkur enn halda Gøtu-bygd og Struer vera, vil eg heldur enn gjarna vedda teir tríggjar £5-seðlarnar í reyvarlummanum uppá, at portugisisk kaffihús ella indiskur hampur er ein verulig trotvøra--sum merkir, at uppfatanin av bygdarlívinum sum beinasamari ella fryntligari enn býirnir má vera kvalifiserað.

Líka so væl sum tað eru ríkiligani nógv av trongsýnisfólki og ein riðil av liberalum bygdarfólki, er tað yvirhøvur so, at um tú ert myrkur, asiati ella samkyndur, vilt tú fyrr ella seinni koma til ta niðurstøðu, at London, Keypmannahavn, enntá Tórshavn, er væl "beinasamari" ella "fryntligari".

Og kortini, ein av aðalorsøkunum førdar fram sum tann einskæraða grundgevingin fyri at búgva ella flyta út á bygd er "tað er eitt betri stað at ala upp børn". So tey í Gøtu og Struer fara uttan iva at vaksa fram, ella, sum bygdarfólk høvdu sagt, koma til mans, uttan nakrantíð at hava hildið saman við onkrum við øðrvísi húðarliti, fremmandum ella einum, ið ikki dylur sína samkynd. Á hin bógvin, aftaná 20 ár kringaður av bygdarlívi dugir tú ið hvussu er at síggja mun á fimm ymiskum másasløgum.

Og, gaman í, tað kunna vera nakrir fyrimunir hjá óvitum við at vaksa fram úti á bygd, men tá ið óvitarnir náa kynbúningaraldurin, vil tað vera nokkso ósannlíkt at hoyra teir siga: "Áh, mamma og babba, túsund, túsund takk fyri at vit fluttu út á bygd, tí hvussu stuttligt og áhugavert tað enn er í Tórshavn, Keypmannahavn ella London, kann tað ikki vera líka so gott sum at "hanga út" hvørt ævinliga kvøld uttan fyri CAFE-IN í Norðskála. MUSS-MUSS!"

Tí er tað, at ein og hvør úti á bygd við einum sindri av neista flytur hin vegin--inn í býin. Júst sum Beethoven mátti flyta til Wien má eitt og hvørt evnaligt orkestur flyta til ein bý--og sum er hví, at óevnaligir bólkar sum, ja, Black Panthers, APPARAT og neyðars vilja-vera-øðrvísi-Mold eiga at flyta "hin vegin"!

Túrurin frá býi til bygdarlagið ber vanliga við sær eina afturtøku frá lívinum og ímóti einum borgaraligum útsýni – hygg bara at teim plássunum, ið fara at atkvøða borgaraligt 20. januar. Eg veit, at tað er vanligt at verða høgrasnaraður sum tú eldast, men frá at skrála "Mao er størstur" til "men nú dámar mær betur at telja páskaliljur og binda summardáa-krans", er av sonnum undrunarvert.

---

*Framhald av síðu 11*

gerðir sum tann einstaka fyritøkan má taka, um virkisbygnað, fígging av virkseminum, marknaðarføring av framleiðsluni osfr.

Tá "umboð fyri vinnuna" úttalað seg um samfelagsbúskaparlig viðurskifti í fjølmiðlum og aðrastaðni, tosa tey sjálvsagt út frá tí forstáilsi, sum teirra útbúgving í virkisbúskaparfrøði ella royndir í ymsum fyritøkum hava givið teimum.

Men hugtøk, sum eru av avgerandi týdningi fyri ta einstøku fyritøkuna, og av somu orsøk eru ógvuliga frammalaga í hugaheiminum hjá einum virkisbúskaparfrøðingi, eru ofta lítið áhugaverd ella beinleiðis meiningsleys sæð frá samfelagsbúskaparligum sjónarhorni. Tí er tað, sum hesi "umboð fyri vinnuna" siga í slíkum samanhangum, ofta lítið fremjandi fyri samfelagsbúskaparliga innlitið hjá almenninginum og ikki sjáldan beinleiðis til skaða.

**Kappingarføri**

Eitt gott dømi um hetta er hugtakið "kappingarføri". Meðan kappingarføri er altavgerandi fyri ta einstøku fyritøkuna, er hugtakið meira ella minni meiningsleyst samfelagsbúskaparliga sæð. Um ein fyritøka hevur trupulleikar við kappingarførinum skyldast tað oftast, at aðrar fyritøkur í sama landi hava gott kappingarføri. Til dømis er trupulleikin hjá føroyskum flakavirkjum ikki, at tey ikki eru kappingarfør í lønum við eysturlendsk flakavirkir, men at tey ikki eru kappingarfør í lønum við aðrar føroyskar fyritøkur.

Hvat lønin á flakavirkjunum krevst vera, veldst um, hvørt arbeiðsmegin heldur tað vera nóg lokkandi at arbeiða á einum flakavirki í mun til at arbeiða onkra aðrastaðni. Her er altso talan um kapping hjá flakavirkjunum móti øðrum føroyskum fyritøkum um arbeiðsmegina.

Klára flakavirkini ikki at gjalda ta løn, aðrar fyritøkur kunnu gjalda, kann vera, at flakavirkir fyri at yvirliva noyðast at fáa útlendska arbeiðsmegi at arbeiða fyri sáttmálaløn, tí heimliga arbeiðsmegin fæst ikki á flakavirki at arbeiða vegna betri umstøður í øðrum fyritøkum. Innflutningurin av útlendskari arbeiðsmegi til at skera flak er tí eitt tekin um, at meginparturin av føroysku arbeiðsmegini kann skapa størri virðisøking — og harvið fáa meira í løn - við at takast við annað enn at skera flak.

At gera trupulleikar við kappingarførinum hjá nøkrum flakavirkjum til ein samfelagsbúskaparligan trupulleika er tí ógrundað, og byggir á manglandi samfelagsbúskaparligt innlit.

**Ikki ideologi — men búskaparfrøði**

Onkur kann halda, at búskaparfrøðingar, ið ikki eru bangnir um "føroyska kappingarføri", síggja ikki "búskaparliga veruleikan" orsakað av ideologiskari trúgv upp á at sjálvvirkandi marknaðarkreftir nokk skulu laga alt til tað besta.

Men arbeiðið hjá Búskaparráðnum eru ikki grundað á ideologiska fanatismu. Arbeiðið er grundað einans á eina sannføring um, at búskaparfrøðiliga læran er amboðið, sum gevur besta innlitið í samfelagsbúskaparlig viðurskifti. Tilmælini frá Búskaparráðnum standast tí frá greiningum, har samfelagsbúskaparfrøðin er grundleggjandi amboðið.

Samfelagsbúskaparfrøðin er ikki ideologisk sjálv, hóast viðgangast skal, at summir samfelagsbúskaparfrøðingar kóka ideologiska súpan, hagar teir tveita stumpar av búskaparfrøði í saman við skrambli av øllum handa slag.

Hinvegin eru nógvir av vanligu tankunum hjá almenninginum um samfelagsbúskaparlig viðurskifti bygdir á ideologi, sum ikki heldur til eina nærri gjøgnumgongd. At "vit liva av fiskivinnuni" og aðrar slíkar grundhugsanir eru ideologiskar. Tær eru ikki bygdar á vísindaligar greiningar, men bara á at "tað vita øll" og "abbi segði altíð …"

Tá so virkisbúskaparfrøði verður brúkt til at gera greiningar um samfelagsbúskaparlig viðurskifti út frá slíkum ógrundaðum ideologiskum grundfatanum kann úrslitið ikki gerast annað enn meiningsleyst ella beinleiðis skeivt.

**Búskaparráðið og búskapurin**

Búskaparráðið er ikki ein samling av ovastaprestum í eini sekt ella av gandakallum, sum sita og hyggja í krystallkúlur fyri at spáa um framtíðina. Tilmælini koma ikki dettandi av himni, skrivað á steintalvur. Búskaparráðið roynir eftir førimuni at gera greiningar av samfelagsbúskaparligum viðurskiftum av týdningi fyri føroyska búskapin, bygdar á tað vísindaliga grundarlag, sum gjøgnum 300 ár er framleitt til endamálið.

Meiningin er, at hesar greiningar - og tey úrslit, tær koma til — skulu vera við til at skapa innlit hjá almenninginum fyri teim fyribrigdum, sum gera seg galdandi í føroyska búskapinum, soleiðis at almenningurin kann pressa politikkararnar til avgerðir, sum eru til gagns fyri búskaparligu vælferðina hjá øllum borgarum í landinum. Hvørja ferð útsagnir hjá Búskaparráðnum fáa onkran at kenna seg noyddan til at umhugsa sín mest grundfesta barnalærdóm um samfelagsbúskaparlig viðurskifti, hevur hetta eydnast.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Professións bachelor í sjúkrarøktarfrøði



Arnleyg Svabo Haraldsen í Sandavági hevur lokið prógv sum professións bachelor í sjúkrarøktarfrøði tann 1. november 2003 á Hvidovre Sjúkrahúsi.

*Kelda: Vøka – Blað Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga*

## Professións bachelor í sjúkrarøktarfrøði



Paula K. Ólavsdóttir í Klaksvík hevur lokið prógv sum professións bachelor í sjúkrarøktarfrøði tann 31. oktober 2003 á Diakonissestiftelsens Sygeplejeskole for H.S. Frederiksberg.

*Kelda: Vøka – Blað Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga*

## 80 ár

Í dag, 9. januar, fyllur Símun Gullaksen, Hattarvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag í Bøgøtu 3 frá kl. 17.00-22.00.

## Gullbrúdleyp

Í dag, 9. januar, hava hjúnini Elinborg og Sólarn Solmunde í Syðrugøtu, gullbrúdleyp.
Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Dagurin

**9. januar. Julianus.** Búði í Egyptalandi, og varð hálshøgdur umleið ár 300, tá ið rómverski keisarin Diokletianus legði eftir teimum kristnu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at pápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Erik Arge**
Argir

andaðist á Lágargarði mikudagin 7. januar, 85 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 10. januar kl. 14.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**




Lesið Sosialin


# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:......................................................................
Bústaður:..................................................................
Bygd/býur:...............................................Tel:..................
Evt. arbeiðspláss:.........................................................

Merkisdagurin er: .........................................................

Innsendari: ..........................................Tel:......................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 341800/216135, fax 341801, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo





# MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin